# & Myndaviðgerð fotoarbeiði

Dámar tær væl at arbeiða við teldu og at brúka tíni kreativu evni, samstundis sum tær dámar at vera mitt í rokanum, ert tú kanska júst tann, vit leita eftir.

Vit skulu brúka eitt fólk, sum nakrar tímar um vikuna ella hálva tíð – onkuntíð við eitt sindur "skeivum arbeiðstíðum" – kann arbeiða við myndaviðgerð og øðrum fyrifallandi arbeiði í okkara fotoatelieri.

Hetta er eitt spennandi starv og arbeiðspláss, har eingin dagur er eins og nýggjar avbjóðingar alla tíðina eru á skránni. Møguleiki er fyri, at starvið verður víðkað til fleiri tímar ella fulla tíð.

Send okkum nakrar reglur um teg sjálva/n og orða eina einfalda umsókn, so venda vit aftur fyri at finna útav, um hetta er nakað fyri bæði teg og okkum.

Hevur tú onkrar spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkara á telefon 31 71 11, men helst vilja vit frætta skrivliga frá tær. Stíla brævið til:

**FOTOSTUDIO**

v/Per á Hædd og Finnur Justinussen
Sundsvegur 8 · Postboks 1308 · 110 Tórshavn
haedd@post.olivant.fo

## KUNNGERÐ

Til veljarar til kommunuvalið **11. november 2008** í Sumbiar kommunu.

Vallistarnir verða lagdir fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá

**14. oktober til 28. oktober 2008**

Klaga um, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við, skal í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin verða send bygdaráðnum, sum kannar og tekur endaliga avgerð í málinum.

*Sumba, tann 13. oktober 2008*

**Valstýrið í Sumbiar kommunu**



Skopunar Kommuna lýsur hervið bygningin, sum stendir norðuri á ídnaðarøkinum, til sølu um hóskandi boð fast.

Nærri fæst at vita við at venda sær til kommunuskrivstovuna á tlf. nr. 361349

**SKOPUNAR KOMMUNA**

Telefon 361349 – Telefax 361795
t-postur:skopunko@post.olivant.fo – FO-240 Skopun

## Starv

Søkt verður eftir einum framfýsnum fólki til leksiuhjálp til næmingar í Vágs- og Porkeris kommunu

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur læraraútbúgving ella líknandi førleika, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðar samstarvseginleikar.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, leiðara á Sosialu Deild tlf. 37 36 04, ella til Sakaris Dimon, samskipara á NSR Suður tlf. 238771 ella t-post sakaris@nsrsudur.fo

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild att.: Anna Djurhuus í seinasta lagi
**17. oktober 2008 kl 12.**

**Sosiala Deild**
**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**
Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo

## KUNNGERÐ

Gjørt verður við hesum kunnugt, at vallistin til kommunuvalið 11. november 2008, liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni, frá týsdegnum 14. oktober 2008 til týsdagin 28. oktober 2008 í vanligari skrivstovutíð (10.00 til 15.00).

Kæra um, at onkur ikki er komin á vallistan, ella at onkur av órøttum er tikin við, skal skrivliga vera valnevndini ella bygdarráðnum í hendi innan týsdagin 4. november 2008.

*13. oktober 2008*

**KVÍVÍKAR KOMMUNA**
**Víkarvegur 5 • FO-340 Kvívík**
**Tlf. 421294**

**Sjómannskvinnuringurin í Kollafirði**
kemur saman í Missiónshúsinum
**mikukvøldið 15. oktober kl. 20:00**

**Allar kvinnur eru vælkomnar.**

**Sjómannskvinnuringurin í Kollafirði**
*Mary Thomassen*

## KUNNGERÐ

Vísandi til kunngerð frá innlendismálaráðnum fer kommunuval fram

**týsdagin tann 11. november 2008.**

**Valið til Kvívíkar Bygdarráð fer fram:**
**Fyri bygdirnar Skælingur,**
**Leynar, Stykkið og Kvívík:** á kommunuskrivstovuni í Kvívík
**Fyri Válin:** í Vála skúla.

**Atkvøðutíðin er frá kl. 10.00 til kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá valið lýst liðugt.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, sum verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar **kl. 10.00 tann 11. november 2008.**

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella væntandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða kommunuskrivstovuni frá, helst innan kl. 15.00, mánadagin 10. november 2008, á tlf. 42 12 94.

**Valkort:**
Valkort eru send út við postinum og um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

*Tann 14. oktober 2008*

**Valnevndin í Kvívík**
*Tummas Marni Joensen, form.*

## KUNNGERÐ
**um valevnislistar til kommunuvalið í Kvívíkar kommunu 11. nov. 2008**

Í Kvívíkar Kommunu skal ein valevnislisti hava í mesta lagi 11 valevni.

Valevnini skulu vera skilliga lýst við navni, starvi, føðingardegi og bústaði.

Listin skal vera undirskrivaður av í minsta lagi 10 og í mesta lagi 25 veljarum sum stillarum. Hjálagdur skal vera ein serligur listi yvir stillararnar, hvar teir eru skilliga lýstir við navni, starvi, bústaði og føðingardegi.

Ein persónur kann bert vera stillari á einu lista.

Valevnislistar skulu latast inn til kommununa ella valnevndarformannin í seinasta lagi **týsdagin 21. oktober 2008 kl. 18.00.**
*Tann 14. oktober 2008*

**Valnevndin í Kvívík**
*Tummas Marni Joensen, form.*